# Viku-blaðið steðgað

Randi Jacobsen

Vikublaðið, sum í hesum umfarinum er komið út regluliga síðan desember 2010, er fyribils steðgað.

Vikublaðið varð upprunaliga stovnað í januar 2000 av Sp/f Petur & Petur. Í juli 2007 varð tað selt til Vinnivitan, sum seldi tað víðari til Dimmalætting í apríl 2008. Í desember sama ár fór Vikublaðið av kóranum.

So skjótt sum trotabúgvið gjørt upp, søktu Petur & Petur skrásetingina um at fáa gamla navnið aftur, og tað fingu teir, tí navnið var tókt

Men nú hevur Dimmalætting farið í rættin fyri at fáa navnið aftur.

– Tað gera vit út frá vørumerkjalógini. Dimmalætting rindaði í sínari tíð fleiri milliónir krónur fyri vørumerkið hjá Vikublaðnum og konseptið. Eg haldi, at vit skylda gomlu eigarunum at gera eina roynd at fáa navnið aftur, sjálvt um vit ongar ætlanir hava um at geva tað út, sum marknaðurin nú er, sigur Eyðfinnur Reyðberg, nevndarformaður í Vikublaðnum.

Hann trýr ikki uppá, at marknaður er í løtuni fyri ókeypis lýsingarbløðum, tí lýsingarmarknaðurin er so nógv tódnaður.

Hinir mugu gjarna gera tað, men teir kundu brúkt eitt annað navn. Dimmalætting gav í sínari tíð níggju milliónir krónur fyri navnið og konseptið, sigur Eyðfinn Reyðberg.

Nevndin í Sp/f Petur & Petur ásannar, at lýsingarmarknaðurin er broyttur, og tá nú Dimmalætting hevur stevnt eftir at fáa navnið aftur, hevur nevndin valt at steðga útgávuni, í hvussu er fyribils.

Vikublaðið heldur tó fram at selja bíligu ferðirnar.






*Hans Eiler Hammer er ovurfegin um, at rætturin frídømdi hann fyri at hava sent dóttrini eini smsboð fyri ónærisligum innihaldi, men torført er at fáa reinsað umdømi sítt aftur*

# Fær ikki starv í Føroyum aftur

**Presturin Hans Eiler Hammer hevur síðan í fjør søkt minst fimtan størv, sum hann metti seg vera væl skikkaðan til, í Føroyum, men hann hevur ongantíð frætt aftur. Sakarmálið, sum hann nú er fríkendur í í Noregi, er óivað orsøkin, sigur hann**

Randi Jacobsen

Hýrurin var góður heima hjá prestinum Hans Eileri Hammer og familju hansara á Nesi í gjár.

Henda dagin fingu tey boðini um, at Hans Eiler Hammer var fríkendur fyri ákæruna um, at hann skuldi hava sent dóttrini eini smsboð við ónærisligum innihaldi. Ákæran varð reist móti honum, meðan familjan búði í Berlevaag í Noregi.

Trýstið var so stórt á familjuna, meðan tey búðu í Noregi, at familjan valdi at flyta aftur til Føroya. Og Hans Eiler Hammer segði seg úr starvinum í Berlevaag fyri eisini at flyta aftur til Føroya. Tatð var tó ikki bara trýstið, sum fekk hann at flyta heimaftur. Elsta dótturin hevði fingið staðfest eina sjúku, og sjúkan hevði við sær, at gentan fleiri ferðir í heyst noyddist á sjúkrahús í Danmark. Hans Eiler Hammer helt ikki, at konan Linda kundi vera einsmøll sum foreldur at taka sær av teimum trupulleikunum.

## Ein lætti

– Tað var ein ómetaligur stórur lætti at fáa hesi boðini. Sjálvt um eg alla tíðina havi noktað meg sekan og visti, at eg einki skeivt hevði gjørt, kundi ikki vera vísur í, at tað fór at enda væl, sigur Hans Eiler Hammer.

Hann er ikki sørt argur inn á arbeiðið hjá norska ákæruvaldinum í hesum málinum. Eitt nú var 15 ára gamla dótturin avhoyrd undan hjásita og slapp hvørki at síggja ella góðkenna frágreiðing sína.

Politiið hefti seg við nøkur notat, sum gentan hevði skrivað, men av eini ella aðrari orsøk vórðu hesi notat ikki løgd fram í rættinum, har ákæruvaldið stóð eftir við ongum prógvum móti prestinum.

## Noyddist at fara

Kirkjumyndugleikarnir í Noregi royndu at tala Hans Eiler Hammer frá at siga upp. Teir skiltu væl, at torført var hjá honum at halda fram í Berlevaag, sum er eitt lítið pláss. Hann fekk í boði at flyta til annað stað í sóknini, men tað vildi Hans Eiler Hammer ikki, tí hann hevði valt at søkja til Berlevaag, haraftrat var vandi fyri, at trupulleikarnir fluttu við. Trupulleikarnir, sum vóru illgitingar um, at okkurt kanska kortini var í ákæruninum.

Síðan Hans Eiler Hammer kom heim aftur, hevur hann verið nakrar túrar við línubátinum Reynsatindi, men dreymur hansara hevur alla tíðina at fingið fast starv á landi í Føroyum.

## Hoyrir einki aftur

– Síðan eg kom heimaftur, havi eg søkt minst 15 størv í Føroyum, og øll hesi størv havi eg hildið meg verið næstan best skikkaðan til, men eg eri ongantíð so frægt sum kallaður inn til samtalu, sigur Hans Eiler Hammer, sum ikki er í iva um orsøkina. Orsøkin er sakarmálið í Noregi.

Hann hevur tó ikki mist vónina um, at hann ein dag fer at fáa eitt starv, har hann kann brúka útbúgving sína. Ein møguleiki er at fara av landinum at arbeiða, men familjan flytur ikki við, tí tey trívast øll best í Føroyum. Hans Eiler Hammer hevur heldur ikki hug at binda seg fast til nakað arbeiði uttanlands, men kanska í nakrar mánaðir.

Enn er ógreitt, um ákæruvaldið í Noregi fer at kæra dómin.

## Til reiðar til umdyst

– Ger ákæruvaldið tað, eru vit til reiðar at taka umdystin. Hevði dómurin verið tann øvugti, hevði eg kært, tí fyri meg er hetta málið so prinsippielt, sigur Hans Eiler Hammer.

Hann fer nú at tosa við advokat síni í Noregi, um hann skal stevnu Berlevaag kommunu ella øðrum. Málið hevur kostað familjuni í minsta lagi hálva millión krónur, og haraftrat hevur tað kostað honum hansara umdømi.

– Áðrenn alt hetta hendi, varð eg brúktur allastaðni sum prestur, tí eg hevði so drúgvar royndir. Eg var tann royndasti presturin, sum øll høvdu álit á. Við málinum var alt sett upp á spæl, og sjálvt um eg nú eri fullkomiliga frídømdur, er mítt áður so góða umdømið skakað, sigur Hans Eiler Hammer.